Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Føroyskt teknmál

Spurningar:

1. Hvussu er støðan hjá føroyskum teknmáli?
2. Hvar kann ein læra føroyskt teknmál, og hvør og hvussu mong læra føroyskt teknmál í løtuni?
3. Eru ætlanir um at styrkja støðuna hjá føroyskum teknmáli í okkara samfelagi, og um ja, á hvønn hátt verður hetta so gjørt?

Viðmerkingar:
Føroyskt teknmál er eitt egið teknmál. Arbeiðið fyri deyv í Føroyum hevur nógv ár á baki. Deyvafelag Føroya varð stovnað í Gøtu í 1972 og hevur síðani virkað innan flestallar tættir, sum viðvíkja deyvum, m.a. fyri føroyskum teknmáli.

Herfyri vóru í danskari grein settir viðkomandi spurningar sum: hvør hevur ábyrgdina av føroyskum teknmáli, hvør er støðan hjá føroyskum teknmáli. Verður tað lært og nýtt í stóran ella lítlan mun, og hava vit eitt sterkt umhvørvi, har teknmál verður nýtt.

Ein háttur at tryggja, at børn, ið bera brek, njóta øll mannarættindi og grundleggjandi frælsi javnbjóðis øðrum børnum og fáa rætt til frítt at siga frá sínum áskoðanum í øllum málum, sum viðvíkja teimum og soleiðis fáa ávirkan á egið lív kann m.a. tryggjast við, at børn, sum eru deyv, læra teknmál og fáa undirvísing í hóskandi málum, samskiftisháttum og samskiftismiðlum, sum á besta hátt tryggja fakliga og sosiala menning hjá tí einstaka.

Spurningurin kann eisini vera, í hvønn mun vit eiga tryggja og menna føroyskt teknmál sum eitt mál í Føroyum, tí tað er serstakt og søguligt.

Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 11. mai 2022

Hanna Jensen